

*Hansina Iversen heldur fast í tí nonfigurativa úttrykkinum*



*Ein rættiliga abstrakt kvinnumynd hjá Torbjørn Olsen*




*Flotta plakatin hjá Bjarna Werner Sørensen*



*Klassisk kompositión hjá Zachariasi Heinesen*

Perspektivið er onkursvegna tað sama sum hjá endurnýggjaranum Matras, tá hann í yrking síni í næstan barnsligum opinleika staðfestir: »Nú ert tú eitt skip«. Á sama hátt sum Christian Matras, ið búði uttanlands stóran part av ævi sínari, er eisini Tóroddur Poulsen útiseti og eitt slag av heimstaðaryrkjara, og hetta sama kunnu vit í grundini eisini siga um listamannin Tummas Jákup Thomsen, sum í mong ár hevur búð í Danmark.

## Og líta vit upp at mastrartræ...

Tummas Jákup Thomsen er ógvuliga merkisverdur listamaður, sum til tíðir letur úr hondum verk so primitiv og løgin, at tey meira enn bera við hugtakið »outsider art«. Men hann er eisini serstakliga originalur í sínum verkum heilt frá »Landescape« bilinum, sum hann tíðliga í hálvfemsunum málaði eitt siðbundið føroyskt landslag á, til ta framúrskarandi sjálvsmyndina í skærum, hvítum einsemi, sum varð framsýnd á Heystframsýningini fyri nøkrum árum síðani.

Eitt eyðkenni hjá Tummas Jákupi er, at hann brúkar blýant á lørift saman við máling t.d. í løgnu, psykadelisku myndini »Masturin«, sum í hugburði bæði er merkt av surrealismu og nýromantikki. Vit síggja inn á ein blóðreyðan mastrabul í forgrundini, og aftan fyri hendan sæst djúpbláur sjógvur, land og himnahválvið við einfaldaðum ljósstrálum, sum dugnalig børn kunnu finna uppá at tekna tað, men sum eisini kann brúkast í politiskum ella religiøsum myndum – allastaðni, har tær tørvar lættfatiligan ljóma. Myndin er hugtakandi við mótsetningum á fleiri økjum heilt frá muninum millum ta feitu skyggjandi reyðu málingina í matrini og blýantsturra himmalin. Horisontali bygnaðurin er áhugaverdur bæði upp ímóti vertikala mastraskapinum, men eisini av tí, at landslagið er sett eitt sindur á skák. Lítla skákrørslan speirekur og undirgravar onkursvegna tjóðskaparliga huglagið í myndini, ið bæði stendst av sjálvum myndevnisvalinum (landslag í sólarljóma) fyri ikki at tala um einfaldaða litavalið, ið gevur flaggdagsfestligt hugasamband við Merkið.

## Aftur á slóðina

Anker Mortensen leitar í sínum myndum aftur á sína egnu sermerktu slóð í 1990´unum, tá listamaðurin gjørdi fleiri pappírsverk, ið vóru myndað av eini ørgrynnu av krutli og tekningum, sum í monumanu endurtøkuni fáa ein serligan bæði barnsligan og rituellan dám. Hugtakandi myndir hansara á Heystframsýningini eru koparprent av plátunum, ið eru partar av hansara nýggja listaverki í skúlanum í Hovi.

Aggi Ásgeirsdóttir hevur valt at hava eina fotoframløgu á einum sjónvarpsskíggja av sínum verkum, ið hanga á sama skúla í Hovi, og tey eru vøkur, hóast tað tykist løgið, at hava tílíkar fotomyndir av myndlist á eini myndlistaframsýning. Annars er úttrykkið hjá Aggi í hennara dekorativu lýsingunum av lívrunnum verum í slekt við myndamálið hjá listamanninum Bjarne Werner Sørensen (sum umframt egin verk á framsýningini hevur gjørt

Sosialurin